# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

# Føroya Bilmekling við bíligari bilum

**Vit kunnu levera nýggjar persónbilar, vøruvognar og minibussar til munandi lægri prísir, enn teir annars kunnu keypast fyri í Føroyum, sigur Hugo Kristiansen frá Føroya Bilmekling**

BILAR




*Skúlavognurin hjá Hugo Kristiansen er ein Jaguar X-Type Estate, sum hann keypti spildurnýggjan fyrr í ár. Hugo sigur, at Føroya Bilmekling kann levera nýggjar Jaguar frá 350.000 krónum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hugo Kristiansen er koyrilærari og býr í Runavík. Skúlavognurin hjá honum er ein Jaguar X-Type Estate, sum hann keypti spildurnýggjan fyrr í ár. Hugo rekur eisini Føroya Bilmekling og hevur gott samband við útlendskar leverandørar um levering av nýggjum bilum.

Hugo sigur, at Føroya Bilmekling er ikki ein bilasøla, men vit formidla nýggj akfør, tað verið seg persónbilar, vøruvognar ella minibussar til munandi lægri prísir, enn teir annars kunnu keypast fyri í Føroyum. Talan er um eina tænastu til kundar, sum ynskja sær ein ávísan bil til ein bíligari prís.

Vit levera so gott sum øll bilmerkir. Fólk kunna venda sær til okkum, og siga hvat tað er fyri ein bilur, tey ynskja sær. So kanna vit, hvat bilurin kann skaffast fyri, og hvussu long leveringstíðin er. Talan er bert um nýggjar bilar. Vit taka ikki brúktar bilar í býti, sigur Hugo.

Hann nevnir trý dømir: Ein bilur sum t.d. kostar 700.000 krónur at keypa í Føroyum verður umleið 150.000 krónur bíligari, ein sum kostar hálva millión verður umleið 100.000 krónur bíligari, og við at keypa ein bil sum annars kostar umleið 200.000 í Føroyum, eru umleið 40-50.000 krónur at spara. Prísmunurin er serliga stórur á teimum dýru bilunum, men tað eru altíð pengar at spara, sigur Hugo.

Hjá okkum sær kundin akkurát, hvat bilurin kostar, og hvat Føroya Bilmekling fær í vinningi. Kundin fær eina spesifiseraða rokning við t.d. prísinum á sjálvum bilinum, tolli, frakt skrásetingargjaldi og vinningi. Har er einki dult, vit upplýsa prísin á bilinum í Føroyum við nummarplátum. Bilurin verður leveraður koyriklárur við nummarplátum, sigur Hugo.

Hugo sigur, at hann hevur altíð havt stóran áhuga fyri bilum, og hann hevur vita, at tað ber til at skaffa nýggjar bilar munandi bíligari, enn hvat teir verða seldir fyri í Føroyum.

# Nýtt umboð fyri Shiny Wheels

JFK Heilsøla umboðar nú Shiny Wheels felgureins í Føroyum. Hetta merkir, at øll søla av Shiny Wheels í Føroyum fer umvegis JFK Heilsølu.

Sølan av Shiny Wheels hevur verið sera góð, so sigast kann, at føroyingar veruliga hava tikið væl ímóti tí. Vøran fæst kring alt landið, bæði í matvøruhandlum, serhandlum og bensinstøðum.

Sølan av Shiny Wheels uttan fyri Føroyar er eisini støðugt vaksandi og framtíðarvónirnar eru bjartar.

Shiny Wheels felgureins er ment av Incra Sp/F v/ Regin W. Dalsgaard og framleitt í samstarvi við Kemilux Industri.



*Regin W. Dalsgaard hevur ment Shiny Wheels saman við Kemilux Industri*